## VEÐRIÐ



Petur Skeel Jacobsen greiðir frá um veðrið




**Veðrið í morgin:**
Fleyr til gul av suðri og útsynningi og yvirhøvur turt og sólglottar, men mjørkaflókar. Hitin millum 8 og 11 stig.




**Veðrið hósdagin og fríggjadagin:**
Lot til andøvsgul av suðri, fríggjadagin upp í stívt andøvsgul. Yvirhøvur turt og sólglottar, men mjørkaflókar. Hitin millum 10 og 14 stig.

**Veðrið leygardagin og sunnudagin:**
Leygardagin veksur hann vindin upp í ein strúk av vestri, men væntandi turt. Hitin um 10 stig. Sunnudagin upp í hvassan vind av vestri og ælingur, partvís kavi, men eisini sólglottar. Hitin niður í eini 3 stig.

# Føroyingar vilja hava Prix Føroyar aftur



**402 føroyingar eru við í nýggja Facebook bólkinum "Prix Føroyar vinir". Bólkurin vil hava Prix Føroyar aftur á dagsskrá**

Facebook bólkar hópa seg upp, og tú fært innbjóðing til alskyns bólkar við alskyns endamálum hvønn dag.

Nú er ein bólkur stovnaður undir heitinum "Prix Føroyar vinir" Stigtakarar siga soleiðis um bólkin.

- Vit sum minnast aftur á Prix Føroyar við gleði og ynskja at tónleikakappingin og sjónvarpssendingin verða enduruppfunnin.

Prix Føroyar var ein tónleikakapping sum Norðurlandahúsið tók stig til í 1995 og sum helt fram til 2005, í samstarvi við FUT, SvF, ÚF og við hjálp frá ymiskum áhugafeløgum í Føroyum.

Endamálið við Prix Føroyum var fyrst og fremst, at geva føroyskum tónleikarum møguleikan at framføra egin løg, á einari proffessionellari konsert.

Ymsar hugsan koma til sjóndar á síðuni hjá bólkinum. Millum annað sigur ein stuðularar soleiðis:

- JA!! Prix Føroyar come baaack!!! Føroyski tónleika pallurin hevur aldrin blomstra so nógv sum tá Prixi var.

- Tað manglar alvorliga kapping á føroyska tónleikapallinum!!!

- Má erligt siga, at um eg skuldi valt ímillum festivalar ella prixi, so hevði eg valt prixi.

Tónleikakappingar av ymsum slag hava stungið seg upp í londunum kring okkum. Nevnast kann X-Factor og Talent, og hava hesar kappingar fingið sera stóra undirtøku ímillum hyggjararnar. Í Føroyum hevur eingin føroysk tónleika kapping verið víst í sjónvarpinum, síðani Prix Føroyar var tikið av skíggjanum.

### Hitalagið kring knøttin

| | |
|---|---|
| Illulisat | -17 |
| Nuuk | -11 |
| Qaqortoq | -2 |
| Ammassalik | -2 |
| Saint John's | -- |
| Halifax | -- |
| Reykjavík | 1 |
| Seyðisfjørður | 1 |
| Tórshavn | 9 |
| Lerwick | 8 |
| Aberdeen | 12 |
| London | 12 |
| Tromsø | -- |
| Bergen | 6 |
| Oslo | -- |
| Stokkhólm | 4 |
| Keypmannah. | 6 |
| Helsinki | 1 |
| Moskva | -1 |
| Berlin | 8 |
| Warzawa | 10 |
| Kiev | 1 |
| Bukarest | 9 |
| Paris | 12 |
| Madrid | 20 |
| Róm | 16 |
| Malorca | 18 |
| Athen | 15 |
| Malta | 5 |
| Tunis | 20 |
| Beijing | 19 |
| New Dehli | 28 |
| Bangkok | 35 |
| Jakarta | 32 |
| Sydney | -- |
| New York | 10 |
| Miami | 25 |
| Los Angeles | 14 |
| Meksikobýur | -- |
| Panama | 32 |
| La Paz | 14 |
| Rio de Janeiro | -- |
| Buenos Aires | 21 |

## LUFTTRÝSTIÐ




**Í gjár:**
Eitt hátrýst, 1037 hPa. yvir Skotlandi fer spakuliga í landsynning. Eitt lágtrýst, 1004 hPa. á 50N-30V fer norðureftir og hitabrúgvin haðani verður yvir Føroyum mikunáttina.




**Í dag:**
Lágtrýstið yvir Grønlandsfjørðinum fer spakuliga í landnyrðing og hitabrúgvin yvir Føroyum fer somuleiðis í landnyrðing.

## HITALAGIÐ




Hitalagið mált frá 15/03 kl. 06[00] – 16/03 06[00]. Hitin í gjár: 5,9°
Minsti hiti máldur í mars: -8,7° - Mesti hiti máldur í mars: 12,0°

## AVFALLIÐ




Avfallið: 10,0 mm – mált frá 10/03 kl. 06[00] – 11/03 06[00].
Avfallið higartil í mars: 65 mm




javni
– Virkin og virðismikil
www.javni.fo

## VESTFALLSKYRRINDI

7. mars – Mánin næstur jørðini
11. mars – Fullmáni
18. mars – Seinna kvarter
19. mars – Mánin longst frá jørðini

Kelda. Álmanakkin 2008

| Dagur | Suðuroyar-/ Vágafirði fp. | Suðuroyar-/ Vágafirði sp. | Skúvoyar-/ Skopunarfirði fp. | Skúvoyar-/ Skopunarfirði sp. | Hestfirði/ Sundalagnum fp. | Hestfirði/ Sundalagnum sp. | Vestmanna-sundi fp. | Vestmanna-sundi sp. | Mykines-firði fp. | Mykines-firði sp. | Nólsoyar-firði fp. | Nólsoyar-firði sp. | 2 fj. í LS úr Mjóvanesi fp. | 2 fj. í LS úr Mjóvanesi sp. | Leirvíksfirði/ Haraldssundi fp. | Leirvíksfirði/ Haraldssundi sp. | Kalsoyar-/ Svínoyarfirði fp. | Kalsoyar-/ Svínoyarfirði sp. | Hvanna-sundi fp. | Hvanna-sundi sp. | Fugloyar-firði fp. | Fugloyar-firði sp. |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 17. mars | 11:14 | 23:53 | 10:14 | 22:53 | 10:29 | 23:08 | 00:50 | 13:14 | 01:50 | 14:14 | 09:29 | 22:08 | 08:29 | 21:08 | 11:29 | - | 00:05 | 12:29 | 10:59 | 23:38 | - | 12:14 |
| 18. mars | - | 12:32 | 11:32 | - | 11:47 | - | 01:53 | 14:32 | 02:53 | 15:32 | 10:47 | 23:25 | 09:47 | 22:27 | 00:08 | 12:47 | 01:08 | 13:47 | - | 12:17 | 00:53 | 13:32 |
| 19. mars | 01:10 | 13:49 | 00:10 | 12:49 | 00:25 | 13:04 | 03:10 | 15:49 | 04:10 | 16:49 | - | 12:04 | 11:04 | 23:26 | 01:25 | 14:04 | 02:25 | 15:04 | 00:55 | 13:34 | 02:10 | 14:49 |
| 20. mars | 02:11 | 14:33 | 01:11 | 13:33 | 01:26 | 13:48 | 04:11 | 16:33 | 05:11 | 17:33 | 00:26 | 12:48 | 11:50 | - | 02:26 | 14:48 | 03:26 | 15:48 | 01:56 | 14:18 | 03:11 | 15:33 |
| 21. mars | 02:54 | 15:15 | 01:54 | 14:15 | 02:09 | 14:30 | 04:54 | 17:15 | 05:54 | 18:15 | 01:09 | 13:30 | 00:09 | 12:30 | 03:09 | 15:30 | 04:09 | 16:30 | 02:39 | 15:00 | 03:54 | 16:15 |